HJÁLPARGRUNNURIN FYRI ÓARBEIÐSFØRAR FISKIMENN

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: Postboks 135, FO-110 Tórshavn, ella at ringja á tlf. 28 30 01.
Føroya Skipara- og Navigatørfelag, postboks 248 - 110 Tórshavn, formaðurin hevur tlf. 216971.
Føroya Fiskimannafelag tlf. 311569.

Endamál grunsins er:
at veita stuðul til eftirsitandi hjá føroyskum fiskimonnum, til niðurberjing av tuberklum ella til annað sjúkufyribyrgjandi ella lekjandi virksemi í Føroyum og at veita stuðul til fiskimenn, ið vegna sjúku eru óarbeiðsførir sum fiskimenn og ikki fáa nóg mikið á annan hátt.

Umsóknir til Hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. desember 2012.

Umsóknir ið koma inn eftir hetta, verða ikki tiknar við.

HJÁLPARGRUNNURIN

Eykaaðalfundur í Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags

Lýst verður til eykaaðalfund í Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags mánadagin 17. desember kl. 14.00.

Fundurin verður hildin í hølunum hjá Føroya Arbeiðarafelag, Tjarnardeild 7, Tórshavn.

Fundarskrá: Broyting av grein 9, stk. 1 í viðtøkum grunsins

Tórshavn, hin 27. november 2012

Nevndin

Føroya Arbeiðarafelag

Íbúð til friðarligt fólk

Vit hava eina íbúð í vesturbýnum í Havn til leigu.
Íbúðin er ikki stór, men ný ístandsett.
Gott baðirúm, har møguleiki er at hava vaskimaskinu.
Køkur: Ovnur v/plátum, køliskáp við frystibox og uppvaskimaskina.
1 kamar.
Egin inngongd.
Er væl egnað til eitt friðarligt fólk.

Tlf. 217300
lp@ognir.fo

VINIR LOVA IKKI VINUM AT KOYRA SKÍT.
FFF

Leys størv í Tórshavnar kommunu

STARVSFÓLK TIL VIKUSKIFTISVAKTIR

Til búeindirnar á Boðanesheiminum verður søkt eftir tímaløntum starvsfólkum at starvast í vikuskiftisvaktum.

Brennir tú fyri eldraøkinum og fyri at skapa góð og virðilig kor fyri húsfólkið? Vilt tú vera við at mynda, menna og skapa eitt nýtt røktarheim?

- Har 64 eldri fara at búgva
- Har fakliga dygdin av veittum tænastum verður sett í hásætið
- Sum áhaldandi er við til at menna heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk til heimabúgvandi pensionistar
- Har starvsfólk trívast, mennast og hava tað gott

So er tað tær, vit leita eftir.

Førleikakrøv
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur ella heilsurøktari
- Prógv sum heilsuhjálpari
- Áhuga at arbeiða innan eldraøkið
- Góð evni at samskifta í skrift og talu
- Evni at nýta tvørfakliga tilfeingi sum verður á heiminum
- KT-førleika á brúkarastøði
- Sjúkrarøktarfrøðilesandi, heilsurøktara- og heilsuhjálparanæmingar og ófaklærd eru eisini vælkomin at søkja størvini

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett skjótast tilber og sett sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsókn o.a.
Umsókn saman við góðkenning, prógvum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Tórshavnar kommunu, Postmoga 32, FO-110 Tórshavn ella til teldupost:torshavn@torshavn.fo.

Umsóknarfreistin er 2. januar 2013 kl 12.00.

Meira fæst at vita
Um størvini við at hyggja á www.torshavn.fo ella við at venda sær til Jóngerð Guttesen, leiðara, telefon 224151

STARVSFÓLK

Søkt verður eftir starvsfólki til kaffistovuna í Svimjihøllini í Gundadali, at arbeiða 16 tímar um vikuna at byrja 2. januar 2013.

Arbeiðstíðin er frá kl. 11:00 til kl. 15:00, mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsókn o.a.
Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn ella við telduposti torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi sunnudagin 16. desember 2012.

Meira fæst at vita
Um starvið við at venda sær til Guðmund Joensen, tel. 224551, t.p. gudmundur@torshavn.fo, ella Gunnar Steymoy, leiðari, tel. 224550, t.p. gunnars@torshavn.fo.

PEDAGOGAR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Frítíðarskúlan við Løgmannabreyt eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna og einum pedagogi til námsfrøðiligt tiltak, at arbeiða uml.15 tímar um vikuna, at byrja skjótast gjørlig.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í staðin í tíðaravmarkað starv.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn o.a.
Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til Frítíðarskúlan við Løgmannabreyt, Karlamagnusarbreyt 47, 100 Tórshavn ella við telduposti til ftslog@torshavn.fo í seinasta lagi 15. desember 2012.

Meira fæst at vita
Um starvið við at venda sær til Sandru Mikkelsen, stovnsleiðara, telefon 214364 ella við at hyggja inn á heimasíðuna www.fritidarskulin.fo.

Onnur størv í Tórshavnar Kommunu – Lesið meira á www.torshavn.fo

Umhvørvismálsviðgeri – Heilsu- og Umhvørvisdeildin
Umsóknarfreist 03.12.2012

Lívbjargari – Svimjihøllina í Gundadali
Umsóknarfreist 06.01.2013

Pedagogur – Býlingshúsið undir Fjalli
Umsóknarfreist 17.12.2012

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA